# Gongur strúkandi við forsøluni til Summar Festivalin

**Atgongumerkini til Summar Festivalin eru farin at ganga undan. Nýggjasta uppgerðin vísir, at 4.750 atgongumerki eru seld, og nú verða bara 250 atgongumerki afturat seld í forsølu. Endaliga skráin er nú kunngjørd**

SUMMARFESTIVALUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



Tað verða sera nógv fólk til Summar Festivalin í ár.

Forsølan hevur gingið sera væl, og nýggjasta uppgerðin hjá fyrireikarunum vísir, at 4.750 atgongumerki eru seld.

– Undirtøkan er heilt ótrúlig, og tað fegnast vit um. Vit hava avmarkað forsøluna til 5000 atgongumerki til hvønn dagin. Tí selja vit bara 250 atgongumerki afturat fyribils, sigur Steintór Rasmussen, sum er ein av fyrireikarunum.

Summar Festivalurin verður fríggjadagin og leygardagin, og skráin fyri festivalin er júst kunngjørd. Hon sæst millum annað á heimasíðuni hjá festivalinum - www.summarfestivalur.fo

### McFadden fríggjakvøld og Shaky leygarkvøld

Fyrireikararnir hava nú almannakunngjørt skránna fyri festivalin, og tað verður nógv spennandi at hoyra bæði fríggjakvøldið og leygarkvøldið.

Báðar dagarnar spæla stór føroysk og útlendsk tónleikanøvn.

Fríggjakvøldið verður írski Brian McFadden høvuðsnavnið, meðan bæði Shakin' Stevens, Ana Johnsson og Anne Linnet verða at hoyra leygarkvøldið. Umframt tey stóru útlendsku nøvnini eru nógvir spennandi føroyskir bólkar við bæði kvøldini.

Í ár verða tríggir pallar á Summar Festivalinum. Stóri pallurin er aftur í ár á Vágsbø, men afturat honum verða nú tveir aðrir pallar. Á Flags-pallinum fara fleiri bólkar at spæla, meðan Silva-pallurin fer at hýsa tónleiki, undirhaldi, gykli og dansi.

– Vit halda okkum hava sett saman eina sera spennandi skrá, har børn og vaksin í øllum aldri kunnu fáa tveir framúr góðar festivaldagar við heimskendum og landskendum tónleiki og undirhaldi, siga fyrireikararnir.

### Skráin
### Fríggjadagur 5. august 2005

| | Stóri pallur | Flags pallur | Silva pallur |
|---|---|---|---|
| 19.30 | | | Dólgarnir |
| 20.15 | | The Dreams | |
| 21.00 | | | Dansishow |
| 21.30 | | Lawetz | |
| 22.15 | | | Poppkorn |
| 22.30 | Úlpurnar | | |
| 22.45 | | | Gykl |
| 23.00 | Brian McFadden (I) | | |
| 00.30 | Týr | | |
| 02.00 | | Festivaldansur All That Tain | |

### Leygardagur 6. august 2005

| | Stóri pallur | Flags pallur | Silva pallur |
|---|---|---|---|
| 15.00 | Barna & Trøllashow | | |
| 16.30 | Science Fiction | | |
| 16.45 | | | Fívil og undirhald |
| 17.00 | | | Silvi |
| 17.15 | | Brandur | |
| 17.45 | | | Gykl og gaman |
| 18.00 | Anne Linnet (DK) | | |
| 19.00 | | I AM | |
| 19.30 | | | Ola Nordskar (NO) |
| 20.00 | Ana Johnsson (SE) | | |
| 21.00 | | Tvey av Kamarinum | |
| 21.30 | | | Fríur pallur |
| 22.00 | Shakin' Stevens (UK) | | |
| 23.30 | | Eyðun & Terji | |
| 00.30 | Straight Ahead | | |
| 01.15 | Dynamitt | | |
| 02.00 | | Festivaldansur Showmenn | |

# Eivør sum lærari



**Eivør Pálsdóttir er við á fleiri nýggjum íslendskum fløgum og fern ú eisini at royna seg sum lærari**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Íslendski føroyavinurin Jens Guð hevur júst verið í Føroyum á G! festivali og skrivar jaliga um tiltakið í Frettablaðnum undir yvirskriftini; Skinkufeit festival.

Hann veit annars at siga úr Íslandi, íslendingar framvegis fegnir læna Eivør Pálsdóttir og meta hana sum eina av sínum egnu. Kanska gleðiligt, men tó metir Jens, at hetta er eitt sindur løgið.

Eivør er nú við á eini savnsfløgu, ið nevnist »Íslendsku divurnar«. Ein nýggj fløga nevnist eisini »Acoustic Iceland« har 20 av teim best umtóktu sangarunum í Íslandi luttaka við akkustiskum løgum. Har eru t.d. Bubbi, Rómeo og Júlia, Eivør við Við gengum tvø.

Jens er Eivør fjeppari um ein háls, og tað kennist honum eitt sindur løgið, at íslendarar soleiðis »læna« føroysku Eivør til eina fløgu, nevnd Acoustic Iceland.

### Lærari

tað nýggjasta er, at Eivør nú fer at royna seg sum lærari í sangi. Songskúli Mariu og Siggu, ein skúli fyri ungar sangarar, lýsir nú við, at Eivør er ein av lærarum teirra hendan komandi veturin.

Tær siga við Jens Guð, at Eivør er ein av størstu sangarum í dag, hon hevur tað tær nevna klassiska bakgrund, og tær vilja fegnar, at næmingarnir sleppa at nema sær kunnleika frá teim bestu innan popptónleikin. Eivør skal taka sær av tannárinum, ið longu hava roynt seg innan popptónleikin.